# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# First Lego League aftur á skránni

**Kappingin 2007 er um orku, og verður hon nevnd »The Energy Puzzle« – Orkugátan**

*Eirikur Lindenskov*
*Eirikur@sosialurin.fo*

Nú er seinasti møguleiki at melda seg til First Lego League kappingina 2007. Ert tú í iva, hvat First Lego League, so ber til at fara inn á heimasíðuna www.hjernekraft.org . Kappingin 2007 er um orku og verður hon nevnd "The Energy Puzzle", Orkugátan. Kappingin fevnir um nógv lond kring allan knøttin, og fleiri túsund ung og børn eru í hesum døgum upptikin av at finna møguleikar fyri varandi orkukeldum, sum kunnu vera við til at vísa á burðardyggar og umhvørvisvinarligar loysnir.

Tey, sum kundu hugsað sær at verið við, kunnu finna, tó í mesta lagi 12, sum eru millum 10 og 16 ár – við einum liðleiðara, sum er ábyrgdarfólk og er yvir 18 ár.

- Vit hava fleiri lið, sum eru frá skúlum kring landið, men ikki er neyðugt at hoyra til ein skúla, bara savna eitt lið og ein liðleiðara – far síðan í gongd. Men tað má gerast skjótt, tí freistin fyri at vera við er 1. september, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

Tað kostar 2500 kr at tekna seg, tað er fyri máttu, byggitilfar, blusur og annað, sum skal brúkast til kappingina. Umframt hetta skal brúkast ein robottur, borð og telda.

Sum nevnt, so er evnið í ár "The Energy Puzzle", endaliga orðingin av uppgávuni og skipanin av robottborðinum, verður kunngjørt 15. sept. á Føroya Tele, har liðini eisini fáa máttur, blusur og byggitilfar. Síðan er av álvara at fara í gongd.

Freistin at melda til er 1. sept. – sigast kann frá teldupostadr. harrieth@skulin.fo

Meira fæst at vita á Lego League heimasíðuni og á www.nvd.fo

†

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum, at okkara elskaði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Arnhold Jespersen**
Trongisvági

andaðist í heiminum mánadagin 27. august, 93 ára gamal.
Kistan fer úr heiminum mikudagin 29. august kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Salem hósdagin kl. 12.30.

*Familjunnar vegna*
**Paula og børnini**

# Articon ger arbeiði umaftur

Byggifelagið Articon ger arbeiðið í Dýrindalsgøtu í Hoyvík umaftur fyri egna rokning

Talan var um ósketni, tá jørð-, kloakk- og betongarbeiðið til 42 randarhús í Hoyvíkshaganum varð gjørt. Tað hevur ein óheft frágreiðing hjá sýnsmetingarfólki staðfest.

Arbeiðið varð so mikið illa gjørt, at alt gólvið nú verður tikið uppaftur og gjørt av nýggjum.

Tórshavnar kommuna hevur gjørt semju við Articon, sum gjørdi arbeiðið, og eftir henni skal byggifelagið gera arbeiðið umaftur fyri egna rokning, soleiðis at kommunan fær gólvini handað, sum ásett í metingarfrágreiðingini.

**aj**

## Rasmus ger nýggja fløgu

Rasmus Rasmussen arbeiðir í løtuni við síni triðju fløgu sum einstaklingur. Hann sigur á síni myspace síðu, at hann er komin á hálva leið við at gera løgini og væntar, at fløgan kemur út fyri jól. Hann heldur, at enn er dekan ov tíðliga at siga hvussu fløgan fer at ljóða, men at døma eftir løgunum higartil, so vera hetta ein uppaftur róligari útgáva enn instrumentala útávan »Edelweiss«, sum Rasmus lat úr hondum í mars. Nýggja útgávan verður eisini instrumental, men hon hevur færri trummur og gittarin er meira fokus.

BÍLIGA GRAVIMASKINU?

HER ER HON



**Gravmaskina TB-001**
Diesel motor • vekt: 600 kg.

Prísur bert 40.000,00 kr uttan mvg.

Setur tú hana saman sjálvur fæst hon munandi bíligari.

O.K.HEILSØLA & MASKINUR FO 430 HVALVÍK
TLF. 422394 • WWW.OKHEILSOLA.COM

# Nýggj vikarstova sett á stovn

**Føroya Care kallast nýggj vikarstova, sum sum Oda Andreasen og Poula Debes Clementsen hava sett á stovn**

STARVSAVLOYSING
*Leo Poulsen*
*Leo@sosialurin.fo*



*Oda Andreasen er annar av stigtakarunum til nýggja vikarstovu í Havn*
*Mynd: Leo Poulsen*

Nú fer ein nýggj vikarstova at byrja sítt virksemi her á landi. Talan er um eina vikarstovu til sjúkrahús og aðrar heilsustovnar í landinum.

Stigtakarar eru Oda Andreasen og Poula Debes Clementsen. Í hesum sambandi søkja tær báðar eftir sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum, pleygarum, sjúkrahjálparum og heilsuhjálparum, sum hava hug at arbeiða sum vikarar ella avloysarar. Tær vilja fegnar frætta frá, so væl pensjóneraðum fólki sum frá nýútbúnum, tí hetta er ein góður háttur at finna seg til rættis í ynskistarvi, halda tær.

Oda Andreasen er RAB-skrásett alternativur viðgerði í zonuterapi, hon er sjúkrahjálpari og pleygari og starvast á landssjúkrahúsinum. Poula Debes Clementsen er heilsurøktari og starvast á einum røktarheimi í Havn. Frammanundan hevur hon starvast átta ár á eini vikarstovu í Danmark.

- Av royndum vita vit, at tørvurin á vikarum er stórur her á landi, og tí verða øll, sum hava áhuga at vita meiri um okkara vikarstovu, boðin inn á gólvið mikudagin 29. august millum klokkan 14 og 18, siga tær báðar í tíðindaskrivi.

Vikarstovan heldur til í Magnus Heinasonargøtu 26, har zonuterapiklinikkin hjá Odu er.